# handVERKARIN

2013 BLAÐ NR. 47 HAVNAR HANDVERKARAFELAG



# KUNNING UM EFTIRLØNINA

# GLEÐILIG JÓL OG EITT GOTT NÝGGJÁR



Nú árið er farið at halla vil eg níta høvið til at ynskja limum okkara við familju eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár.

Somuleiðis ynska vit samstarvsfeløgum okkara eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár, við tøkk fyri gott samstarv í brátt farna árið.

### Skrivstovan:

Vanliga telefonavgreiðala er hvønn mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.

Harumframt hava vit telefonavgreiðslu 27. desember frá kl. 9 til 16. og 30. desember frá kl. 9 til 20.

Annars er skrivstovan stongd frá 19. desember 2013; opið verður aftur til vanliga tíð mánadagin tann 6. januar 2014.

*Eli Brimsvík, formaður.*

### Í blaðnum hesa ferð: síða


Gleðilig jól og eitt gott nýggjár . . . s. 2
Kunning um eftirlønina . . . s. 3
Stásilig hølir til ymisk endamál . . . s. 4
Sjúkradagpeningur, tá ið barnið er sjúkt . . . s. 5
Lønartalva . . . s. 6
Hent og góð ráð hjá limunum . . . s. 10
Hann er sekur, ið at sær tekur. . . . s. 12
Handverksmeistarafelagið: Løgmaður má sjálvur í arbeiðsklæðini . . . s. 14
Føroysk skipasøga modelmyndir: Hans Jacob Fuglø . . . s. 16
Felagið eigur nú sjúkragrunnin BATA. . . . s. 22
Sjónarhornið: Koos Kamminga . . . s. 30



Útgevari: Havnar Handverkarafelag · Stoffalág 60 · Box 203 · 110 Tórshavn
Ábyrgdarblaðstjóri: Eli Brimsvík
Blaðstjórn: Media · Umbróting, prent og liðugtgerð: Føroyaprent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
Skrivstovutíð: Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.
Telefon 35 48 00 · fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverkarin@handverk.fo · www.handverk.fo




# KUNNING UM EFTIRLØNINA

**Sum kunnugt kemur nýggj lóg um eftirlønarsamansparing í gildi 1. januar 2014. Tá skulu øll, millum 21 og 67 ár, spara upp til eftirløn.**

Lógin ásetur, at í minsta lagi 1% skal gjaldast til eftirløn. Fyri limir okkara, har eftirløn longu verður goldin, hevur hetta onga ávirkan. Eftirlønargjaldið fyri okkara limir fer til Eftirlønargrunn Havnar Handverkarafelags, og tað **skal** tað eisini aftaná 1. januar 2014.

Nógvir limir hava boðað okkum frá, at teir hava móttikið skriv frá peningastovnum við áheitan um, at stovna nýggja eftirlønarkonto. Hetta er ikki neyðugt. Í teimum lønarsáttmálum, handverkarafeløgini hava við arbeiðsgevarnar, er greitt ásett hvagar eftirlønargjaldið skal gjaldast. **Arbeiðsgevarin skal** flyta eftirlønargjaldið til Eftirlønargrunn Havnar Handverkarafelags á **konto 9870-9905597.** Heitt verður á limirnar at tryggja sær, at hetta verður gjørt.

Handverkarar, serarbeiðarar, lærlingar og sjálvstøðugir handverkarar, har eingin eftirløn verður goldin, eiga at fáa hetta í rættlag, og at venda sær til felagið sum skjótast á **tlf 354800** ella umvegis teldupost: **handverk@handverk.fo**

### Kunning um lívstrygging felagsins

Sum kunnugt eru limirnir í Havnar Handverkarafelag umfataðir av lívstrygging (bólkatrygging) hjá ALKA-forsikring í Danmark. Avtalan við ALKA-forsikring fer úr gildi 1. januar 2014. Nýggj, betra og meiri víðfevnd avtala fyri tryggingina, er nú gjørd við Betri Pensjón. Hendan kemur í gildi 1. januar 2014.

Sum kunnugt kemur nýggj lóg um eftirlønarsamansparing í gildi 1. januar 2014. Lógin heimilar, at ein partur av eftirlønarinngjaldinum kann nýtast til tryggingar.

Sum er, er gjaldið fyri tryggingina partur av limagjaldinum. Felagið hevur tikið avgerð um, at frá 1. januar 2014 verður gjaldið fyri tryggingina ein partur av eftirlønargjaldinum.

Eftirlønargjaldið fyri okkara limir fer til Eftirlønargrunn Havnar Handverkarafelags. Tað er tí umráðandi, at eftirlønargjaldið – eisini aftaná 1. januar 2014 – verður flutt til grunnin. **Arbeiðsgevarin skal** flyta eftirlønargjaldið til grunnin á **konto 9870-9905597.** Heitt verður á limirnar at tryggja sær, at hetta verður gjørt.

Í teimum førum, har einki eftirlønargjald verður inngoldið, eitt nú vegna sjúku, ella arbeiðsloysi, eiga limirnir at seta seg í sambamd við felagið, um teir framvegis ynskja, at vera umfataðir av tryggingini. Tað er ábyrgdin hjá tí einstaka liminum at syrgja fyri, at hesi viðurskifti eru í lagi.

Eru ivamál ella spurningar, eru limirnar altíð vælkomnir at venda sær til felagið á tlf 354800 ella umvegis teldupost: **handverk@handverk.fo**

Ì komandi blað, verður kunnað nærri um tryggingina.

# Stásilig hølir til ymisk endamál





1. Hølini kunnu útleigast til limir, eins og onnur uttanfyri felagið; talan kann vera um feløg, stovnar ella einstaklingar.

2. Farast skal væl um hølini, og skulu tey latast aftur í sama standi, sum tá ið tey vóru útleigað.

Møguligir skaðar á innbúgv og útbúnað undir útleigan, skal alt fyri eitt fráboðast felagnum, og fult endurgjald fyri umvæling/nýkeyp skal rindast felagnum.

3. Hølini verða leiga út til hesi endamál:

A. Vanlig tiltøk og fundir eftir vanliga arbeiðstíð.
B. Tiltøk, ið eru í vanligari arbeiðstíð og eftir vanliga arbeiðstíð.
C. Tiltøk ið fevna um meira enn ein dag.
D. Framsýningar, eftir nærri avtalu.
E. Merkisdagar (t.d. føðingardag/fermingardag)
F. Skeiðvirksemi.

4. **Prísir.**
Er talan ikki um limir er kostnaðurin við køki pr. kvøld 2.000,- kr.
Limir leiga hølini til Merkisdagar (inkl. nýtslu av køki) fyri 1.000,- kr.
.
Er talan um onnur tiltøk, sum t.d. fevna um fleiri dagar, verður nærri prísur avtalaður.



# SJÚKRADAGPENINGUR, TÁ IÐ BARNIÐ ER SJÚKT



**Foreldur, sum eru heima hjá sjúkum barni, kunnu søkja um dagpening fyri barnsins 1. og 2. sjúkradag.**

## Treytir fyri at fáa dagpening

Treytin fyri at fáa dagpening er, at barnið er undir 14 ár.

Harumframt skal umsøkjarin lúka vanligu treytirnar í dagpeningalógini um rætt til dagpening vegna sjúku. Tað vil siga, at einans umsøkjari, sum hevur tilknýti til arbeiðsmarknaðin, og sum má vera heima frá arbeiði vegna sjúku hjá barni, hevur rætt til dagpening.

## Foreldur

Bæði foreldur kunnu verða heima hjá tí sjúka barninum í senn og fáa dagpening, um tey annars lúka treytirnar.

Foreldur, sum sambært sáttmála hava rætt til frí við løn, tá ið barn/børn teirra eru sjúk, hava ikki rætt til dagpening fyri barnsins 1. og 2. sjúkradag. Um sáttmálin einans tryggjar rætt til løn við barnsins 1. sjúkradag, kann søkjast um dagpening fyri 2. sjúkradag.

## Dagpeningatíðarskeið

Hvørt av foreldrunum kann í mesta lagi fáa dagpening fyri barnsins 1. og 2. sjúkradag í 10 dagar um árið.

Avmarkingin er galdandi uttan mun til tal av børnum. Møguligt er ikki hjá foreldrum at flyta dagar sína millum.

## Umsóknarblað

Dagpeningur verður bert veittur eftir umsókn. Umsóknarblað kann heintast á www.av.fo ella fáast við at venda sær til Almannaverkið.

Arbeiðsgevarin skal á umsóknarblaðnum vátta fráveru og inntøkumiss.

## Læknaváttan

Váttan um fráveru frá arbeiðsgevara verður javnsett við læknaváttan, og neyðugt er tí ikki við váttan frá lækna.

Omanfyristandandi upplýsingar eru frá heimasíðuni hjá Almannaverkinum **www.av.fo** „Barnsins 1. og 2. sjúkradagur“ undir „Arbeiði og Figgjarlig trygd“.

**Tímaløn handverkarar:**

| | | |
|---|---|---|
| Longri útbúgving | | kr 128,93 |
| Styttri útbúgving | | kr 123,73 |

**Fastløntur handverkari:** kr 22.347,44
- við 3 ára starvstíð kr 22.705,00

**Yvirtíðarlønir:**

| | | |
|---|---|---|
| Fyrstu 4 tímarnar | + 35% | kr 174,06 |
| Næstu 3 tímarnar | + 60% | kr 206,29 |
| Fylgjandi tímar | + 100% | kr 257,86 |
| Leygar-, sunnu- og halgidagar | + 100% | kr 257,86 |

1. mai og nýggjársaftan eru heilir frídagar.
Flaggdagur, grundlógardagur,
1. nov., jólaaftan eru frídagar eftir kl. 12.00
og arbeiði í mattíð + 100% kr 257,86

**Viðbøtur: + hesi % av handverkaralønini.**

| | | |
|---|---|---|
| Amboðspeningur | 1,00% | kr 1,29 |
| Skitiarbeiðspeningur | 0,41% | kr 0,53 |
| Bergholsarbeiði | 8,28% | kr 10,68 |
| Dampketilsarbeiði | 8,28% | kr 10,68 |
| Olju-og lýsitangaarbeiði og arbeiði í smáum tangum | 8,28% | kr 10,68 |
| Skittfiska- og sildalastarbeiði | 8,28% | kr 10,68 |

Vanliga arbeiðsvikan er 40 tímar

**Bakarar:**

| | | |
|---|---|---|
| Kl. 04-07 | + kr 65 | kr 193,93 |
| Kl. 04-07 vikuskifti | + kr 100 | kr 228,93 |

**Servisufak:**

| | | |
|---|---|---|
| Leygardag kl. 08 – 14 | + 35% | kr 174,06 |
| aftaná kl. 14 | + 100% | kr 257,86 |

**Skiftisarbeiði:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. bólkur | | kr 128,93 |
| 2. bólkur | 6,63% | kr 137,48 |
| 3. bólkur | 9,11% | kr 140,68 |

**Serarbeiðarar:** (við útbúgving) 120,48

**Serarbeiðarar:** (uttan útbúgving)

| | | |
|---|---|---|
| 1. árið | | 115,39 |
| 2. árið | 1,45% | 117,06 |
| 3. árið | 2,92% | 118,76 |
| 4. árið | 4,41% | 120,48 |

**Starvstíðarviðbót**
Fyri 3 ára starvstíð 1,60%

| **LÆRLINGALØNIR** | | Um tíman | Um vikuna |
|---|---|---|---|
| 1. árið 32% | 32% | kr 41,26 | kr 1.650,40 |
| 2. árið 40% | 40% | kr 51,57 | kr 2.062,80 |
| 3. árið 45% | 45% | kr 58,02 | kr 2.320,80 |
| 4. árið 55% | 55% | kr 70,91 | kr 2.836,40 |
| 5. árið 70% | 70% | kr 90,25 | kr 3.610,00 |

Pensiónsgrunnur (lærlingar): 7,50%

Fyri yvirarbeiði verður øll læruárini goldið

| | | |
|---|---|---|
| serarbeið.løn á 1. ári | kr 115,39 | + hesi % |
| Fyrstu 4 tímarnar | + 35% | kr 155,78 |
| Næstu 3 tímarnar | + 60% | kr 184,62 |
| Fylgjandi tímar | + 100% | kr 230,78 |

Leygardag:

| | | |
|---|---|---|
| Fyrstu 5 tímarnar | + 35% | kr 155,78 |
| Fylgjandi tímar | + 60% | kr 184,62 |
| Sunnu- og halgidagar: | + 100% | kr 230,78 |

**Lærlingaviðbøtur fyri forskotna tíð**

| | |
|---|---|
| *Bakaralærlingar* | |
| Allar dagar kl. 18.00 - 04.00 | kr 35,00 |
| Sunnu- og halgidagar kl. 00.00 - 24.00 og frídagar | kr 25,00 |
| *Kokka- og tænaralærlingar* | |
| Gerandisdagar kl. 18.00 - 06.00 | kr 4,00 |
| Leygar-, sunnu- og halgidagar | kr 5,50 |
| *Frisørlærlingar* | |
| Sunnudagar verða goldnir eins og yvirtíð hjá lærlingum | |

**ANNAÐ**

| | |
|---|---|
| *Gjøld sbrt. sáttmála:* | |
| VITAN (Eftirútbúgvingargr.) 2X10oyru/tím. | |
| Pensiónsgrunnur | 13,00% |
| *Lógarásett gjøld* | |
| Samhaldsfasti | 1,75% |
| ALS gjald frá 01.01.2012 | 1,25% |
| Barsilsskipan | 0,62% |
| Frítíðarløn | 12,00% |






# HENT OG GÓÐ RÁÐ HJÁ LIMUNUM

**Avgreiðslutíðir felagsins:**
Mánadag til og við hósdag frá kl. 9 til 15.

**Limagjald og lívstrygging:**
Limagjaldið er kr. 500,00 um mánaðin, tá limir hava gjaldsavtalu. Í limagjaldinum er íroknað gjald fyri lívstrygging.

Kr. 75,00 verða lagdar afturat í ómaksgjaldi hjá teimum, sum ikki hava fasta gjaldsavtalu.

**Tímaløn:**
Tímalønin frá 1. okt. 2013: Kr. 128, 93 (tað er minstaløn )

Tímalønt eiga at gera setanaravtalu; eru ivamál, so er best at venda sær til skrivstovu felagsins.

3-ára starvsaldur gevur 1,6% lønarhækkan.

**Sveinalønin fyri styttri útbúgvingar:**
kr. 123.73

| | |
|---|---|
| Frítíðarløn: | 12% |

Konta *6460-299.601.6 og 9181-299.700.4*

Vit minna á, at fer arbeiðsgevarin á húsagang og limur eigur løn til góðar, so eigur umsókn at vera latin grunninum, ið verður nevndur „Trygdargrunnurin fyri avreiðingar og lønir v.m.“ Í slíkum føri eigur limur at venda sær til skrivstovu felagsins.

**Eftirløn:**
Arbeiðsgevarin: 13%
Løntakarin: 2%. Tilsamans: 15%
Konta: *9870-9905597*

Sjúkragrunnurin BATI: Er bert fyri limir í Havnar Handverkarafelag

Gjaldið til BATA er frá 1. mars 2013 í limagjaldinum

Umsiting: BATI · handverk@handverk.fo
Postboks 203, 110 Tórshavn
Tlf. 354800 · fax 354801

**Lærlingar:**
Lærlingar gjalda kr. 10,- pr. viku í limagjaldi.
Konta: *6460-401.200.5*
Lærlingalønir ( % av sveinalønini )

| | |
|---|---|
| 1.árið | 32% |
| 2. árið | 40% |
| 3. árið | 45% |
| 4. árið | 55% |
| 5. árið | 70% |
| *Eftirlønir til lærlingar:* | *7,5%* |

Konta: *9870-9905597*

Eftirútbúgvingargrunnurin VITAN
Arbeiðsgevarin: 10 oyru pr. tíma (eftir skatt )
Løntakarin: 10 oyru pr. tíma (eftir skatt)

Umsiting: Vinnuhúsið
Postboks 1039, 110 Tórshavn
Tlf. 309900 · fax 309901
Teldupostur: mikkjal@industry.fo
Konta: *9181 – 495.879.0*
Konta: *6460 – 101.278.0*






# HANN ER SEKUR, IÐ AT SÆR TEKUR




Ein hópur av fakfeløgum hava í seinastuni boða frá, at teirra limir ikki skulu stovna eina nýggja konto til eftirløn; tí teirra viðurskifti eru í lagi.

Av tí at bankarnir hava sent brøv út til fólk, og heitt á tey, um at stovna nýggja konto til eftirløn, hava fakfeløgini kent seg noydd at gera vart við hesi viðurskifti.

Í einum tíðindabroti á Portalinum greiddi Súni Schwartz Jacobsen, forstjóri í Eik Banka, herfyri frá, at hjá teimum er eingin ætlan at yvirtaka eftirlønirnar frá feløgunum.

Hetta ljóðar áhugavert hóast tað kortini ikki tikist at vera allur sannleikin.

## Á Portalinum er forstjórin endurgivin soleiðis:

Eg skal viðganga, at mátin vit hava kunnað uppá, kanska ikki er tann besti, men har er eingin ætlan hjá okkum at yvirtaka eftirlønirnar frá feløgunum hjá handverkarunum.

Tað sigur Súni Schwartz Jacobsen, forstjóri í Eik Banka, tá Portal.fo biður hann fyrihalda seg til hvøssu atfinningarnar frá Palla Djurhuus, formanni í Landsfelag Handverkaranna, á Portal.fo, har hann legði eitt nú Eik Banka undir at loypa óneyðugan ótta á hansara limir.

Súni greiður frá, at Eik Banki hevur sent teimum viðskiftafólkum, sum ikki hava eftirlønarkontur, bræv, har boðað verður frá, at hava tey ikki eftirlønarkontu áðrenn nýggjár, fáa tey ikki løn. Nú er tað so, at limirnir í Landsfelag Handverkaranna hava eftirlønarkontur í eftirlønargrunni Havnar Handverkarafelags, og tær síggjast ikki í bankunum. Tí eru fleiri helst farin at ivast, tá tey hava fingið skrivið frá Eik Banka.

Tað er ikki neyðugt, tí hasi viðurskiftini eru í lagi fyri allar okkara 1.200 limir, sigur Palli Djurhuus, sum eisini legði bankarnar undir at fiska eftir pengunum hjá limum hansara.

Hesum vísir Súni Schwartz Jacobsen tó aftur, tí tað hevur als ikki verið motivið.

Vit gera bara vart við, at tað fyri okkum sær út sum, at kundin hevur ikki nakra eftirlønarkontu. Tí hava vit stovnað kontur til tey, men vilja tey ikki hava tær, so vera tær strikaðar aftur. Og kemur einki inngjald inn á tær, so vera tær eisini strikaðar eftir einari tíð, sigur Súni Schwartz Jacobsen.

Hann tekur aftur íaftur tað, at framgangsmátin kundi havt verið øðrvísi og betur.

Hava vit órógvað fólk við hesum, so mugu vit viðurkenna, at vit kundu havt gjørt tað øðrvísi og betur, men lat meg bara leggja dent á, at vit ikki eru úti eftir pengunum hjá kundunum. Hetta er heilt einfalt ein tænasta, har vit minna fólk á, hvussu neyðugt tað er at hava eftirlønarviðurskiftini uppá pláss tá ársskiftið kemur. Annað liggur ikki í tí, sigur Súni Schwartz Jacobsen.










# HANDVERKSMEISTARAFELAGIÐ: LØGMAÐUR MÁ SJÁLVUR Í ARBEIÐSKLÆÐINI



*Kaj Leo Holm Johannesen*

**Handverksmeistarafelagi: Tað snýr seg ikki bara um lønarlag, men eisini um skatt.**

Dagur og Vika setti í eini sending fokus á trupulleikan, at alt fleiri handverkarar velja at arbeiða uttanlands, og á tankan hjá løgmanni um eitt limagjald til samfelagið.

Í sendingini kom Kaj Leo H. Johannesen, løgmaður, við nøkrum margháttligum útsøgnum. Hann segði m.a., at handverkafeløgini bara kunnu samráða seg til eina hægri løn, og at føroyskir arbeiðsgevarar bara kunnu gjalda sínum starvsfólkum eina „ordiliga“ løn (orð løgmans), so skulu tey nokk koma aftur úr Noregi.

Tað er sera skuffandi fyri handverksvinnuna, bæði meistarar og handverkarar, at hoyra slíkar útsagnir í teirri støðu, sum vinnan er í. Tí fyri tað fyrsta ber ikki til bara at hækka lønina í óðum verki. Og fyri tað næsta hevur tann høgi føroyski lønarskatturin við sær, at føroyska tímalønin skal vera munandi hægri enn tann norska, um ein handverkari skal hava tað sama eftir við at arbeiða í Føroyum sum í Noregi. Tað er tí løgmaður sjálvur, sum má lata seg í arbeiðsklæðini og syrgja fyri, at ferð verður sett á skattanýskipanina og eina lækking í føroyska lønarskattinum.

Føroyska sáttmálalønin, sum fakfeløgini og arbeiðsgevarafeløgini samráða seg til, er ein minsta løn, har gongdin í sáttmálalønini fylgir gongdini í lønarlagnum sum heild. Tað stendur tó arbeiðsgevarunum frítt at gjalda eina hægri løn enn sáttmálalønina, og fleiri handverkmeistarar gjalda eisini eina hægri løn í einari roynd at halda uppá fólkini. Høgi føroyski lønarskatturin ger tað tó fullkomuliga ógjørligt hjá føroyskum arbeiðsgevarum at kappast við ta frammanundan hægri norsku lønina.

Føroysku handverkararnir, sum eru í Noregi vinna ofta eina tímaløn fyri skatt, sum liggur millum 225 og 250 krónur um tíman. Tað klára flestu føroyskir arbeiðsgevarar í verandi støðu ikki at gjalda sínum starvsfólkum. Um lønarskatturin í Føroyum hinvegin var líka lágur sum tann, sum føroyingar rinda í Noregi ella lægri, hevði tað sannlíkt eydnast at varðveitt ein munandi part av handverkarunum í Føroyum.

Tað ber ikki til hjá føroyskum arbeiðsgevarum at gjalda norskar lønir uttan so, at rokningarnar til kundarnar eisini fara at líkjast teimum norsku. Føroysku kundarnir eru neyvan til reiðar at gjalda hetta, heldur ikki tað almenna. Harafturat hevði tað verið drepandi fyri kappingarførið hjá vinnuni, um lønirnar hækkaðu so nógv, uttan at tað var grundað á eina hægri virðisskapan.

Vit eru í einari støðu, har handverkaralønirnar hjá einum av okkara nærmastu grannum, Noreg, eru millum tær hægstu í heiminum. Og tað er serliga orsakað av høgu virðisskapanini í oljuvinnuni, at tað yvirhøvur ber til. Tí ber ikki til at siga, at vit í Føroyum bara kunnu gjalda fólki tær somu lønirnar sum í Noregi. Hóast føroyska sáttmálalønin er hægri enn í fleiri grannalondum, klára vit enn ikki at skapa eitt virði, sum kann kappast við oljutjóðina Noreg.

Løgmaður eigur tí heldur at hyggja eftir, hvat tað almenna kann gera fyri at betra karmarnar hjá vinnuni. Uppá stutt sikt liggur loysnin helst í einum lægri lønarskatti og at betra um møguleikarnar at fáa útlendskar handverkarar til landið. Og tað eru viðurskifti, sum løgmaður og onnur í politisku skipanini fáa gjørt nakað við, so føroyskar fyritøkur ikki framhaldandi noyðast at siga arbeiði frá sær vegna vantandi arbeiðsmegi.

Føroyska lønarlagið kann ikki bara hækka, tí løgmaður sigur tað í Degi og Viku. Um hann veruliga ynskir tað, kann løgmaður saman við restini av samgonguni gera sítt til at betra um umstøðurnar at arbeiða í Føroyum, so tær ikki eru verri enn tær eru uttanlands.



# FØROYSK SKIPASØGA MODELMYNDIR: HANS JACOB FUGLØ



Hans Jacob Fuglø er føddur í Klaksvík í 1929. Sum ungur fór hann á Klaksvíkar Sleipistøð at læra skipasmíð, og stóð lærutíðina til hann varð útbúgvin skipasmiðjur. Har arbeiddi hann í fleiri ár, men var eisini til skips inn ímillum.

Sum 10 ára gamlar gjørdi Hans Jacob – á smíðskeiði í skúlanum – sítt fyrsta skipsmodell. Seinni gjørdi hann onnur modell, t.d. borðabát.

Á ungum árum tók Hans Jacob skeið í tekning, og í fleiri ár vóru verk hansara við á norðoyastevnuframsýningum.

Síðst í 50-árunum fór Hans Jacob at smíða stuttleikabátar, sum hann varð biðin um, og ígjøgnum eitt tíggju ára skeið gjørdust teir 7 í tali.

Í 60-árunum fór hann undir at smíða føroyskar bátar. Her brúkti hann ein bát, sum Jákup Biskupsstøð hevði smíðja, sum fyrimynd til hvusssu hálsubløðini skuldu gerast. Hann fekk tey gomlu mátini frá Jógvan Gerfoss í Mikladali. Við hesum og uppmátingum legði Hans Jacob seg eftir at smíða føroyskar bátar. Við sínum egna sniði og arbeiðshátti smíðaði hann í eini 25 ár 34 bátar í støddini frá 4-mannafari til 10-mannafør.

Tá Hans Jacob í 80-árunum gavst at smíðja føroyskar bátar fór hann rættuliga í holt við at smíðja modellskip. Í 2009 varð skipað fyri eini framsýning í Klaksvík har 22 modelskip, sum hann hevur smíða vóru sýnd fram. Tað var stutt eftir, at hann hevði fylt 80 ár. Á jóansøku í 2012 kom út bók við fotomyndum, sum vóru tiknar á framsýningini. Myndirnar av Ernestine, Verdandi og William Martin eru úr bókini „Føroysk skipasøga – Ein framsýning".





## ERNESTINE: KG 389

- Tveymastra skonnart, smíðað í Dunkerque, Frakland, 1911.
- **Stødd:** 194,4 tons brutto, 134,6 netto. Longd 85,5 føtur.
- **Eigarar:** Brøðurnir Dávur úr Gerðum og J.F. Kjølbro keyptu hana í 1927.
- Fórst á Suðurlandinum 26. mars 1930. Av 25 monnum sjólótust 9.
- **Ogn:** Føroya Fornminnissavn.

# FØROYSK SKIPASØGA MODELMYNDIR: HANS JACOB FUGLØ







## VERDANDI: KG 389

- Slupp, smíðað í Great Yarmounth, Ongland, 1884.
- **Stødd:** 85,12 tons brutto, 50,53 netto. Longd 77,4 føtur.
- **Eigarar:** J. F. Kjølbro (til 1928). Skifti síðani eigara nakrar ferðir, seinasti var Símun Simonsen í Heiðunum.
- Kom til Føroya úr Íslandi 1922. Í november 1944 fór Verdandi av Siglufirði til Reykjavíkar, men kom ongantíð fram. Við vóru 15 mans.
- **Ogn:** Edward Fuglø.

## WILLIAM MARTIN: TN 131

- Slupp, smíðað í Rye, Ongland, 1883.
- **Stødd:** 82,66 tons brutto, 57,23 netto. Longd 74,2 føtur.
- **Heimstaðir:** Tórshavn (til 1928) síðani Rituvík.
- Kom til Føroya úr Lerwick í Hetlandi 1909. Fekk motor í 1930.
- Var søkt út fyri Vátukøllum í Vestmannasundi 1965.
- Model nr. 7/1987.
- **Ogn:** Føroya Fornminnissavn.


Vegurin Langi · Postboks 3309
FO-110 Tórshavn · tel 345 000
fax 345 001 · www.balslev.fo
balslev@balslev.fo
DEWALT
BYGMA
BALSLEV
...til handverkaran


Heildarloysnir
frá Articon
ÁRSINS
VIRKI 2008
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo


aquatherm
BAXI
ROYAL SCANDINAVIAN
VØLUND VARMETEKNIK
magn-line
Nýtt orku-konsept
frá Demich og Magn:
Allar orkuloysnir til sethús
og virkir á einum staði
Les meira um nýggja
orku-konseptið og
Magnline oljuketilin á
demich.fo/orkuhus
SALTANGARÁ
Heiðavegur 80
Tel. 200 380
TÓRSHAVN
Stiðjagøta 2
Tel. 200 300
VÁGUR
Á Marknoyri
Tel. 560 370
HITAPUMPUR
KETLAR
VENTILATIÓN
RØR OG FITTINGS
BAÐIRÚMSMØBLAR
GOSBAÐ
demich
Saltangará
Tórshavn
Vágur
HVS-VEITARIN
TIL VINNUNA
Okkara
døgntænasta
er at hitta á
tel. 200 345
Tí velja handverkarar Demich
Vit veita bestu ráðgevingina
Vit eru landsdekkandi
Vit umboða dygdarvørur
Vit hava kappingarførar prísir
Vit hava góða kundatænastu
Vit hava døgntænastu
Vit hava framkomnar blikksmiðjur
Á smiðjuni í Havn kunnu vit tilevna
inndekningar upp til 3 m
demich
Hiti · Ventilatión · Sanitet
Okkara dygd – tín trygd!
www.demich.fo

# FELAGIÐ EIGUR NÚ SJÚKRAGRUNNIN BATA



*Eli Brimsvík, formaður*

Havnar Handverkarafelag hevur nú fingið fult ræði á sjúkragrunninum, sum nevnist BATI.

Endamálið hjá hesum grunni er, at tímaløntir limir skulu hava rætt til dagpening, sum ískoyti fyri mista inntøku, úr hesum grunni. Hetta hevur verið endamálið hjá grunninum síðan hann varð settur á stovn í 1971.

**Og í reglugerðini hjá grunninum eru treytirnar – fyri at fáa stuðul – soljóðandi:**

At tann sjúki er virkin limur í Havnar Handverkarafelag.

At limagjaldið er goldið.

Sjálvstøðugir limir í felagnum eru eisini fevndir av hesi reglugerð, um teir lúka treytirnar omanfyri og annars treytirnar fyri at fáa dagpening sambært almennu dagpeningaskipanini.

## Soleiðis hevur gongdin verið

Hyggja vit aftureftir, so var tað soleiðis, at Havnar Handverksmeistarafelag og Havnar Handverkarafelag settu grunnin á stovn í 1971, og hevur hann virka frá 1. mai 1973.

Til samráðingarnar í 2007 var ynski frá Meistarafelagnum, annaðhvørt at niðurleggja grunnin ella, at Havnar Handverkararfelag yvirtók grunnin.

Havnar Handverkarafelag var og er av tí áskoðan, at grunnurin er eitt gott íkast til tað útgjald, sum fæst frá dagpeningaskipanini, og vildu vit tí halda áfram við at reka grunnin.

Eftir samráðingar millum feløgini í 2010 varð avrátt, at vit skuldu yvirtaka grunnin, og nú kunnu vit siga, at tað formliga er komið uppá pláss.

Vit hava gjørt neyðugar broytingar, og dagføringar í reglugerðini soleiðis, at hon nú hóskar betur til nútíðina og samfelagið vit liva í. Okkara vón er, at limir okkara framvegis fara at fáa gagn av hesum.

## Reglugerðin fyri sjúkragrunnin BATI

**§ 1.** Navn grunsins er BATI. Havnar Handverkarafelag eigur grunnin, og heimstaður grunsins er Tórshavn.

**§ 2.** Tímaløntir limir Havnar Handverkarafelags hava, verða teir sjúkir, rætt til dagpening úr sjúkragrunninum sum ískoyti fyri mista inntøku.

*Stk. 2.* Treytirnar fyri rætti til hesa hjálp eru:

a) At tann sjúki er virkin limur í Havnar Handverkarafelag.

b) At felagsgjaldið er goldið.

*Stk. 3.* Sjálvstøðugir limir í felagnum eru eisini fevndir av hesi reglugerð, um teir lúka treytirnar omanfyri og annars treytirnar fyri at fáa dagpening sambært almennu dagpeningaskipanini.

**§ 3.** Rætturin til dagpeningahjálp er treytaður av, at handverkari seinastu 4 vikurnar, áðrenn hann er vorðin sjúkur, hevur havt í minsta lagi 40 tíma arbeiði, fyri at fáa fult endurgjald upptil 90%. Annars verður útgoldið lutfalsliga eftir tímatali

a) Feriutíðin telur ikki við.

b) Í verkfalli og verkbanni fellur rætturin til dagpening burtur.

*Stk. 2.* Eru á felagsins øki arbeiðsgreinir, har stuttir arbeiðssteðgir eru, kann stýrið víkja frá reglunum, nevndar eru í *stk. 1.*

**§ 4.** Dagpeningahjálpin fyri fult óarbeiðsføri av sjúku er 90% av handverkaralønini, ið tá er, av hesum verður eisini goldin feriuløn.

*stk. 2.* Sjúkragrunnurin BATI skal bert rinda munin millum ta upphædd, tann almenna dagpeningaskipanin rindar, og ta upphædd, BATI hevur fyriskipað.

*stk 3.* BATI skal, tá talan er um skaða á arbeiðsplássi, gjalda handverkara munin millum tað, sum fæst frá almennu dagpeningaskipanini og fult viðurlag fyri vanliga vikuløn í upp í 14 dagar og síðan eftir galdandi reglum.

*Stk. 4.* Dagpeningahjálpin verður ikki goldin í førum, nevnd niðanfyri.

a) Tá sjúkan er av tílíkum slag, at hon kemur undir tryggingarlógina.

b) Tá tann sjúki sjálvur við vilja ella av grovum gáloysni hevur voldað sær sjúkuna.

c) Tá óarbeiðsførið er komið av drykkjuskapi.

d) Dagpeningahjálpin verður ikki goldin fyri frídagar fyriskipaðir við lóg.

e) Dagpeningahjálpin verður ikki goldin í feriutíðini.

f) Verða almennu lógirnar broyttar og samsvara soleiðis ikki við tær uppsettu reglunar í hesari reglugerð, verða tær broyttar soleiðis, at tær altíð samsvara almennari lóggávu.

# FELAGIÐ EIGUR NÚ SJÚKRAGRUNNIN BATA

**§ 5.** Dagpeningahjálpin tekur við frá 3. sjúkradegi í hvørjum sjúkraskeiði og kann verða goldin upp í 20 vikur, í 6 mánaðir á rað.

*Stk. 2.* Varar sjúkan í 2 vikur ella longur, verður goldin frá fyrsta degi.

*Stk. 3.* Dagpeningurin verður goldin fyri 5 dagar um vikuna,

*Stk. 4.* Fyrsta útgjaldingin fellur fyrsta fríggjadag eftir triðja sjúkradag og síðan eina ferð um vikuna.

**§ 6.** Verður umsóknin um dagpening latin inn í seinasta lagi 30. sjúkradagin, verður tá dagpeningurin goldin frá triðja degnum. Um so er, at umsóknin kemur seinni, verður tá dagpeningurin goldin frá tí degi, umsóknin kemur inn, um ikki serligar umstøður eru, so at frávik kunnu verða gjørd frá hesum.

*Stk. 2.* Umsóknin skal verða skrivað á serligt umsóknarblað, , og skal umsøkjarin undir trúnaðartreytum siga frá sjúku sínari og annars geva aðrar upplýsingar, sum eru týdningarmiklar fyri at gera av rættin til dagpening.

*Stk. 3.* Umsóknarblað skal umframt verða undirskrivað av arbeiðsgevara við neyðugum upplýsingum.

*Stk. 4.* Er umsøkjarin arbeiðsleysur, tá umsóknin verður latin inn, skal læknaváttan verða løgd við umsóknini.

*Stk. 5.* Er umsøkjarin ikki arbeiðsførur, tá tvær vikur eru lidnar frá tí, at sjúkan tók seg upp, kann grunnurin, tá tá verður hildið neyðugt, krevja læknaváttan.

*Stk. 6.* Grunnurin kann annars í øllum førum



krevja læknaváttan, heldur hann tað vera neyðugt. BATI rindar kravda læknaváttan.

**§ 7.** Fingin dagpeningur frá almennu dagpeningaskipanini, sjálvbodnu dagpeningatryggingini ella vanlukkutryggingini skal verða drigin frá tí hjálp, ið BATI skal gjalda. Sama geldur, fær tann sjúki á annan hátt samsýning fyri mista inntøku.

*Stk. 2.* Um so er, at onkur á órættvísum grundarlagi hevur útvegað sær dagpening, missir hann rættin til hjálp fyri ta tíð, sum eftir er av gjaldsskeiðnum, og órættvíst útgoldin hjálp skal verða goldin grunninum aftur. Í slíkum førum kann strýrið fyri grunnin taka avgerð um at sýta tí sjúka rætt til dagpeningahjálp í gjølla tilskilaða tíð, sum tó ikki má fara upp um 2 ár.

**§ 8.** Dagpeningur verður goldin úr grunninum. Inntøka er tann peningur, sum handverkarar gjalda í hann, og peningur, sum á annan hátt fellur til grunnin. Skyldur grunsins at veita dagpening røkka bert so leingi, grunnurin hevur tøkan pening.

*Stk. 2.* Gjald handverkarans í grunnin er partur av limagjaldinum til Havnar Handverkarafelag, sum stýrið saman við nevndini í Havnar Handverkarafelag til hvørja tíð ásetir. Fram til 1. mars 2013 eftirheldur meistari 15 oyru pr. tíma hjá handverkara at flyta til grunnin.

*Stk. 3.* Handverksmeistari hevur skyldu at taka gjald handverkaranna av lønini hvørja viku.

*Stk. 4.* Handverksmeistarin hevur skyldu innan 10 dagar í hvørjum fjórðingsári ella tá lønin verður útgoldin, at lata grunninum yvirlit yvir navn og upphædd hjá hvørjum einstøkum handverkara, sum hevur verið í arbeiði. Yvirlitið skal innihalda upphædd sum handverkari rindar.

*Stk. 5.* Skyldar handverksmeistari grunninum pening sambært § 8, stk. 2, og skuldin er eldri enn 1 mánað og er ikki goldin í seinasta lagi 8 dagar eftir tað, at hann er kravdur eftir henni, kann hendan skuld tá verða innheintað á vanligan rættarligan hátt.

**§ 9.** At stýra grunninum er eitt stýri, sum er mannað á sama hátt og við somu manning sum nevndin í Havnar Handverkarafelag. Stýrið skal umsita grunnin og taka sær av ivamálum viðvíkjandi umsitingini og av tílíkum málum, sum annars koma undir grunnin. Stýrið ger av, hvør hevur dagligu umsitingina av grunninum.

*Stk. 2* Stýrið letur góðkendan grannskoðara grannskoða roknskapin, Stýrið setur grannskoðaran.

*Stk. 3.* Grunnurin umsitur inngoldið gjald í grunnin og goldnan dagpeningahjálp úr grunninum.

*Stk. 4.* Ognir grunsins skulu umsitast fult forsvarliga og á tryggan hátt eitt nú við at hava pening innistandandi í peningastovni, íløgur í virðis– og lánsbrøv og útlán til kommunur.

*Stk. 5.* Í ivamálum kann stýri grunsins taka sær sakkøna hjálp, ið verður lønt av inntøku grunsins.

# FELAGIÐ EIGUR NÚ SJÚKRAGRUNNIN BATA

*Stk. 6.* Umsitingarútreiðslur grunsins verða goldnar av inntøkum grunsins. Stýrislimirnir fáa ikki samsýning fyri sítt arbeiði fyri grunnin.

**§ 10.** Roknskaparár grunsins er frá 1. jannuar til 31. desember.

*Stk. 2.* Grannskoðaður roknskapur skal verða lagdur fram á árliga aðalfundinum hjá Havnar Handverkarafelag.

**§ 11.** Reglugerðin kann verða broytt, heldur stýrið tað verða neyðugt, men broytingarnar skulu verða lagdar fyri aðalfund Havnar Handverkarafelags til góðkenningar. Eru broytingarnar av slíkum slagi, at peningur í grunninum ætlandi skal nýtast til annað endamál enn sbr. hesi reglugerð krevst samtykt um hetta á tveimum fylgjandi aðalfundum Havnar Handverkarafelags og við ¾ av greiddum atkvøðum á báðum aðalfundum.

**§ 12.** Verður frá almennari ella aðrari síðu skipað fyri sjúkrahjálp, ið ger grunnin óneyðugan, verður hann tá tikin av. Til at taka grunnin av krevst samtykt á tveimum aðalfundum Havnar Handverkarafelags á sama hátt sum

*Stk. 2.* Grunnurin fellur burtur, tá ið fjórðingsárið endar, og skal verða lýst í almennum lýsingarblaði.

*Stk. 3.* Ognir grunsins verða gjørdar upp og verða latnar til tað endamál, sum stýrið ger av. Stýrissamtyktin skal somuleiðis góðkennast á tveimum aðalfundum Havnar Handverkarafelags á sama hátt sum **§ 11.**

**§ 13.** Hesin sjúkragrunnur er settur á stovn sum lið í sáttmálasamráðingum millum handverkarar og handverksmeistarar 1. mai 1971.

Reglugerðin er broytt 1. januar 1984, 8. februar 1999 og 1. mars 2005. Seinast 21. februar, 2011 í samband við, at Havnar Handverkarafelag og Havnar Handverksmeistarafelag eru vorðin samd um, at Havnar Handverksmeistarafelag er leyst frá øllum rættindum og skyldum hjá grunninum.

Tórshavn tann 15. februar 2012

Stýri fyri BATA:
Eli Brimsvík, form
Danial P Djurhuus, næstform
Sofus Joensen, stýrisl.
Jacobus Kamminga, stýrisl.
Hjalti Jensson, stýrisl.




**Umsóknarblaðið til skúkragrunnin Batan, kann heintast á www.handverk.fo**










## Húsavarðartænastan

Brattalíð 8 | Tórshavn | hvt@olivant.fo | Tel. 29 00 29



# OGNA TÆR TÍN EGNA HÚSAVØRÐ

- bæði virkir, stovnar og privat kunnu ogna sær ein húsavørð

Vit bjóða virkjum, stovnum og privatum kundum fasta avtalu um ein tímasettan húsavørð. Um ásetta tímatalið ikki verður brúkt ein mánaða, kunnu tímarnir flytast til komandi mánaða, so tað ber til at savna tímar saman.

Vit taka okkum av øllum hugsandi húsavarðar-uppgávum. Er nakað átrokandi, eru vit á staðnum beinanvegin.

Somuleiðis eru vit til taks alt samdøgrið, tá ið bráðneyðugt arbeiði skal gerast.









### Reinsa við turr-ísi



Reinsar blámusopp, mackinur, el-lutir og kann eisini nýtast til sandblásing.
Brúkar ikki vætu. Ring og hoyr nærri.

### Betong-saging



Við okkara nýggju Diamant-ketusag kunnu vit skera tjúkdir upp í 57 cm.
Ring og hoyr nærri.





*Vit átaka okkum eisini alt arbeiði í sambandi við bygging, umbygging og viðlíkahald av: skúlum, sethúsum, raðhúsum, barnagørðum, íbúðarhúsum...*

# Nýggjan køk?

- vit hjálpa tær at finna dreymakøkin



www.2x3.fo











### NÝGGJUR SVARTUR EKSLUSIVUR OG ELEGANTUR KØKUR

Nýggjasti mótin innan køkar í løtuni er svart og hvítt. Tískil hevur Aubo framleitt nýggju lúkuna Melinga Svart, sum beinan vegin bleiv ein bestseljari. Melinga fylgir mótanum, køkurin er einkul, stílreinur og longu blonku handtøkini eru eitt grafiskt íkast til beinu linjurnar.

Vit hjálpa tær fegin við at tekna køkin, soleiðis at hann hóskar júst til tín. Tú skalt bara taka mát av rúminum. Til ber eisini at síggja fleiri køkar frá á www.2x3.fo.

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

Heykavegur 4 · 110 Tórshavn · Tel. 311250 · 2x3@2x3.fo · www.2x3.fo

# SJÓNARHORNIÐ: KOOS KAMMINGA



**Aldur:**
67 ár.

**Børn:**
Kari, Gudrun, Sonja, Hakun og Caroline.

**Núverandi starv:**
Í vatnverkinum hjá Tórshavnar kommunu.

**Útbúgving:** Maskinistútbúgving

**Læra byrjað:**
1959

**Tekniski skúli:**
Í Uithuizen, Holland.

**Útlærdur:**
1963. Eg kom til Føroya, tá eg sigldi við farmaskipinum Arizona. Arbeiddi hjá Phil & SØN til 1970. Flutti so aftur til Hollandi og arbeiddi hjá Schlumberger til 1987. Kom so aftur til Føroya í 1988 og havi síðani arbeitt hjá Tórshavnar Kommunu.

**Frítíðarítriv:**
At ferðast.

**Besta bók:**
Eingin ávís bók, men mær dámar væl søguligar bøkur.

**Besti sangur:**
Ongin ávísur sangur, men mær dámar væl fólkasang, serliga russiskan, sum dømi kann eg nevna Kalinka og Step da step drugom.

**Besti filmur:**
Her eri eg eiðasørur, men eg kann nevna danskar sum t.d. Olsen Banden i Jylland og røðina Huset på Christanshavn.

**Er tað okkurt serstakt arbeiði, sum tú minnist væl:**
Ja, í sambandi við viðlíkahalds-arbeiði av vatnverkinum noyðast vit onkuntíð at stongja fyri vatninum. Einaferð vit høvdu stongt kom ein kona við sápu í hárinum í vindeyga og bað okkum vælsignaði skrúva frá aftur.

**Hvussu eitur besti handverk-arin, sum tú veit um:**
Brynjolvur Ellingsgaard.

**Besti sjónleikari:**
Kaj Leo Holm Johansen, Jákup Veihe og Ove Sprogøe.

**Hvør heldur tú hevur mynda tín persón mest:**
Pápi mín.

**Hevur tú ein ella fleiri søguligar persónar, sum hugtaka teg:**
Í 1775 blakaði Bomme Berend týska herin út úr Gronningen í Hollandi. Bomme Berend var herovasti og tók ikki ímóti tilboðum frá týskarum at fáa 200.000 ríkisdálar afturfyri at yvirgeva býin. Í staðin fekk hann bjóða 200.000 kular. Týskarar fóru heim aftur sum taparar.

**Hvør er tín størsta fyrimynd:**
Nelson Mandela

**Fartelefon:**
Nokia við SIM-kortum

**Telda:**
Dell

**Bilur:**
Citroen C3

**Hvat heldur tú um eftirlønina hjá Havnar Handverkarafelag:**
Tað hevur stóran týdning, at man hevur tann tryggleika, tá man røkkur eftirlønaraldur.

**Hvat heldur tú um samlags-tryggingina hjá Havnar Handverkarafelag:**
Hon er fantastiska góð. T.d. Tá man blívur raktur av hættisligari sjúku fær man útgoldið 80.000 kr. Tað hevur hjálpt nógvum limum – eisini mær.

**Hvat heldur tú er største avbjóðingin hjá einum handverkara í dag:**
Eg arbeiði hjá vatnverkinum hjá Tórshavnar kommunu, har verður meira og meira automatiserað og krøvini til reinføri gerast størri og størri.

Nevnast kann, at tað hevur stóran týdning, at ongin bakteria er í vatninum. Hjá okkum verða vatnroyndir tiknar fjúrtanda hvønn dag og kannað verður um alt er sum tað skal vera.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:**
Tá man hevur góð fólk at arbeiða saman við, tá hýrurin á arbeiðsplássinum er góður. Hjá okkum hevur tað stóran týdning, at arbeiði er væl lagt til rættis.

**Hvat kann øsa teg:**
Tá ið arbeiðið, sum man skal gera, ikki er væl lagt til rættis.

Eg kann leggja afturat, at tað var ein vanlukka, tá man fór at skatta eftirlønir við inngjald.




**1.juli 2013 lækkaðu vit prísin** · Seinnu árini hava vit havt færri skaðar og úrslitið hevur verið gott. Tí lækkaðu vit prísin á privatu akfars- sethúsa- og innbúgvstryggingum við heili 20%.

Soleiðis koma okkara góðu úrslit eisini tær til góðar, tí tað er tú og øll, ið hava tryggingar hjá okkum, ið eiga Tryggingarfelagið Føroyar.

*Sí meira á trygging.fo ella ring 345600*

Høvuðssamstarvsfelagi hjá ÍSF
**Oyggjaleikir 2013**

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*- so ert tú tryggari*